Trygdin umborð á skipunum hjá Strandferðsluni er nógv batnað

Søfartsstyrelsen hevur gjørt fleiri ófráboðað eftirlit umborð á Strandfaraskipum. Úrslitið var heilt gott

ÁKI BERTHOLDSEN

Skip	MOB	Brand-venjing	Fáa fólk av skipinum
Claymore:	9	7	9
Tróndur:	10	9	6
Ternan:	10	9	8
Dúgvan:	7	7	8
Ritan:	9	8	ongin roynd

Viðmerkjast kann, at stigatalvan gongur frá 0 til 10.

Sjóferðslustýrið gevur Strandferðsluni gott skoðsmál fyri trygdina á strandfaraskipunum á einum stiga frá 0-10 fær hon yvirhøvur sera gott skoðsmál

Strandfaraskip Landsins fær gott skoðsmál frá Søfartsstyrelsen í sambandi við trygdareftirlitið í ár.

Hetta vísir úrslitið av teimum royndum, sum Sjóferðslustýrið hevur gjørt umborð á fleiri strandfaraskipum í ár.

Strandferðslan er undir altjóða reglunum um tryggan skiparakstur og um at fyribyrgja dálking

Tað er altjóða felagsskapurin IMO, sum er undir ST, ið hevur gjørt reglurnar og síðan eru tað tey einstøku londini, sum hava ábyrgdina av at seta tær í verk.

Strandferðslan fekk endaligu trygdargóðkenningina í 1996.

– Sjálvt um reglur eru um, hvussu trygdararbeiðið skal leggjast til rættis, so er eisini neyðugt við góðum sjómansskapi, sum ikki beinleiðis kann niðurskrivast.

– Dygdin í hesum partinum av trygdararbeiðnum er treytaður av førleikanum hjá tí einastaka sjómanninum at virka á sjónum undir ymsum truplum umstøðum, sigur Strandferðslan.

Hvønn týdning hendan altjóða trygdargóðkenningin hevur, er Claymore eitt gott dømið um.

– Ein av høvuðsfortreytunum fyri, at leiga yvirhøvur kundi koma uppá tal, var, at Strandferðslan hevði altjóða trygdargóðkenning.

Ein partur av trygdargóðkenningini, er at Sjóferðslustýrið av og á ger ófráboðað eftirlit umborð á skipunum, meðan tey eru í sigling.

– Eftirlitið snýr seg her mest um, hvussu skipari og manning klára vandastøður.

– Eitt nú verður kannað, hvussu væl bjargingararbeiðið gongur, um onkur fer fyri borð. Tað er ein venjing, sum á fakmáli eitur MOB, (Man Over Board)

Somuleiðis verða brandvenjingar gjørdar og kannað verður eftir, hvussu tað gongst at fáa fólk av skipinum í eini vandastøðu.

– Úrslitið av hesum royndum prógvaðu, at trygdarskipanirnar eru batnaðar fyri hvørt ár, sigur Strandferðslan

– Td. vístu eftirlitið umborð á Claymore, at hóast skipari og manning bara høvdu kent skipið í eina góða viku, fingu hesir næstan fult stigatal. Hjá Ternuni og Dúgvuni miseydnaðist tó fyrsta brandroyndin.

Samanumtikið eru stigini hægri enn í fjør.

Leiðslan á Strandferðsluni og skiparar og manning hava seinastu árini lagt nógva orku í at trygdararbeiðið skal vera so gott sum gjørligt.

– Hetta má sigast at vera væl eydnað, tá hugt verður eftir frágreiðingunum frá Sjóferðslustýrinum, sigur Strandferðslan.

Hon leggur afturat, at hon er væl nøgd við úrslitið av trygdararbeiðnum og fer at leggja nógva orku í at halda støðið og at bøta enn meiri um tað, har tað krevst.

Kanningar á Glyvursnesi halda fram

ÁKI BERTHOLDSEN

Tórshavnar Býráð hevur ikki slept dreyminum um ein flogvøll á Glyvursnesi.

Tvørturímóti hevur fíggjarnevndin hjá Býráðnum júst samtykt at gera enn fleiri kanningar, sum síðani skulu verða grundarlagið undir einum komandi flogvølli á Glyvursnesi

Nú í langa tí eru veðurkanningar gjørdar á Glyvursnesi at vita, hvussu veðurlagið er har úti. Kanningar eru longu gjørdar í 22 mánaðir og ætlandi skuldi tær verið lidnar nú í vár.

Men Rambøll, sum er flogvallarráðgevari hjá Tórshavnar Kommunu, og danska veðurstovan, hava mælt til, at veðurkanningar halda fram til 1. september næsta ár.

Leivur Hansen, býráðsformaður sigur, at orsøkin til hetta er, at úrslitið av kanningunum, sum eru gjørdar, vísir, at veðurlagið á Glyvursnesi hevur verið óvanligt í kanningarskeiðnum

Hesar 22 mánaðirnar, kanningarnar hava verið, hevur tað nevniliga verið óvanliga nógv eysturættt á Glyvursnesi. Hetta sæst, tá ið kanningarúrslitið verður samanborið við tær veðurmátingar, sum Veðurstøðin í Havn hevur gjørt seinastu 30 árini.

Leivur Hansen sigur, at bæði Danmarks Meteorologisk Institutt mæla tí til at halda fram við kanningunum fram til 1. september 2001 fyri at fáa eina tryggari kanning.

– Spurningurin er nevniliga, um tað er av berari tilvild, at tað hevur verið so nógv eysturætt í Havnini hesar 22 mánaðirnar, kanningarnar hava verið, ella um hetta er úrslitið av eini varandi veðurlagsbroyting

Leivur Hansen vil ikki siga so nógv um úrslitið av kanningunum, sum eru gjørdar av tí, at veðurlagið hevur verið so óvanligt.

Tó sigur hann í stuttum, at afturímóti flogvøllinum í Vágum, vísa kanningarnar á Glyvursnesi, at ta eru bæði fyrimunir og vansar við veðrinum har.

Býráðsformaðurin leggur tó dent á, at ein altjóða flogvøllur á Glyvursnesi er ein landsuppgáva og at endamálið við kanningunum er bara at gera tað grundleggjandi undanarbeiðið. Tosað hevur eisini verið um at gera ein tyrlupall og eitt stuttan flogvøll á Glyvursnesi, men hetta er heldur ikki nakað, sum hetta býráðið fer at taka støðu til.

– Tað fer at standa til komandi býráð at gera av, sigur Leivur Hansen.

– Tað er óneyðugt hjá landsstýrinum at halda í oyruni á okkum. Tað hava vit eisini prógvað, sigur Leivur Hansen

Kann bremsa Havnini

ÁKI BERTHOLDSEN

– Íløguætlanin hjá kommununi kann koma at bremsa framburðinum hjá Havnini.

Tað heldur Leivur Hansen, býráðsformaður í Havnini um ætlanina hjá Karsten Hansen, landsstýrismanni um at gera eina fimm ára íløguætlan fyri kommunurnar, og at býta landið sundir í øki, sum síðani fáa hvør sína íløgukvotu

Men hann leggur afturat, at hann dugir eisini at síggja fleiri fyrimunir við ætlanini og at hetta tí avgjørt er vert at umhugsa.

– Tað er positivt, at ymisk øki í landinum samstarva um ymsar íløgur, so at kommunurnar í einum øki semjast um, hvar havnin skal útbyggjast, hvussu skúlarnir skulu byggjast út, hvar eldrasambýli skulu verða, o.sfr. Sostatt skuldu vit sloppið frá, at grannakommunur gera íløgur í somu endamál og vit skuldi sloppið undan yvirkapasiteti á nógvum økjum.

– Tað er onki at ivast í, at tey ymsu økini standa sterkari, um kommunurnar standa saman um eina felags útbygging.

Býráðsformaðurin leggur tó dent á, at málið er ikki viðgjørt í býráðnum, og at hetta tískil er talan um hansara egnu sjónarmið.

Eisini í fjør sluppu kommunurnar at gera íløgur eftir fólkatalinum. Tað, sum nú er komið afturat, er landið skal býtast sundur øki. So kunnu kommunurnar í hvørjum øki læna íløgur frá hvørjum øðrum.

Leivur Hansen sigur, at tað kann verða trupult at býta landið sundur í øki.

– Nøkur øki eru sjálvsøgd. Men trupulleiki kann stinga seg upp, tá í miðstaðarøkið skal býtast sundur, ikki minst Eysturoyggin.

Eftir hesi fimm ára ætlanini hjá Karsten Hansen, sleppur Tórshavnar Kommuna at gera íløgur fyri onkustaðni ímillum 60 og 70 milliónir um árið.

Og Leivur Hansen dylir ikki fyri, at hann heldur, at tað er nakað lítið.

–Tær stóru kommunurnar hava skotið upp fyri Landsstýrismanninum, at íløgurnar í tær stóru havnirnar verða tiknar burturúr og ikki verða tengdar uppí vanligar, kommunalar íløgur.

Havnirnar, sum hugsað verður um, eru tær í Tórshavn, Klaksvík, Runavík, Vági, Tvøroyri og í Fuglafirði.

Samstundis hava vit skotið upp, at samlaði íløgukarmurin skal hækka upp í einar 200 milliónir og at einar 30-40 milliónir av teimum verða markaðar til íløgur í áðurnevndu havnir.

Hinvegin skal tað ikki bera til at flyta havnaíløgur til vanligar íløgur

Býráðsformaðurin hevur tó lítlar vónir um, at tað fer at eydnast, tí tað skilst á landsstýrismanninum, at samlaðu íløgurnar fara neyvan upp um 175 milliónir í mesta lagi.

– Og tað tykist sum um landsstýrismaðurin er avgjørdur í síni ætlan. Tí er tað ein spurningur um ikki kommunurnar eiga at fara til verka og royna at fáa sum frægast burturúr, heldur enn at royna at mótmæla, tá ið tað ikki hjálpir kortini.

Leivur Hansen sigur, at hann kundi hugsað sær eina størri upphædd til íløgur í Tórshavnar kommunu, tí tað standa stórar útbyggingar fyri framman.

– Vit skulu gera ein ferjuskráa til tað nýggju Norrønu, og tað er ein størri verkætlan enn tað ljóðar til at vera. Samstundis skal havnaøkið byggjast út og í longdini er ætlanin at leingja tann ytra molan.

Leivur Hansen sigur, at nýggja íløguætlanin kann tí koma at bremsa framburðinum í Havnini.

– Men tað veldst sjálvandi um, hvussu stórur tann endaligi íløgukarmurin verður. Tað veldst sjálvandi eisini um, hvussu Býráðið raðfestir íløgurnar.

Býráðsformaðurin vónar bara, at málið verður avgreitt sum skjótast, so at býráðið fær lagt fíggjarætlanina fyri komandi ár til rættis undir teimum røttu fortreytunum.

Annars heldur hann, at tað er óneyðugt hjá landsstýrinum at leggja seg út í íløguætlanina hjá Tórshavnar Kommunu.

– Hóast Kommunan nú er væl fyri fíggjarliga, duga vit sjálvi at ansa eftir, at vit ikki brúka meiri pening, enn forsvarligt. Tí er mark fyri, hvussu stórar íløgur, vit kunnu gera. Tað hava vit eisini prógvað, tí fyri 10 árum síðani var skuldin hjá Tórshavnar Kommunu 700 milliónir, men við árslok í ár er hon komin niður á 300 milliónir. Annars verður tað avmarkað, hvussu stórar íløgur kommunurnar kunnu gera, tí eftir nýggju kommunulógini kann ein kommuna ikki skylda meiri enn eina álíkning, sigur Leivur Hansen.

Robinson-Morten heldur møtir í Føroyum

Morten Josefsen, eisini kendur undir heitinum Robinson-Morten, kom fríggjadagin til landi› at halda møtir. Ta› er Heimamissións Ungdómur, sum hevur fingi› fer›ina í lag

STEFAN Í SKORINI

Morten Josefsen gjørdist kendur um alt ta› danska ríki›, tá i› hann í fjør var vi› í sendingini Robinson Ekspeditionen hjá TV 3. Robinson Ekspeditionen er í stuttum, at ein bólkur av fólki fór út á eina oydna oyggj, har tey skuldu royna at lívbjarga sær. Morten gjørdist kendur fyri at ver›a ein persónliga trúgvandi, og ta› kom eisini til sjóndar í sendingini, har hann hev›i Bíbliuna vi› sær út á oynna.

Morten lesur gudfrø›i, men hevur ta› seinasta hálva ári› fer›ast runt sum fulltí›ar fyrilestrarhaldari. Hann hevur havt fyrilestrar um Robinson Ekspeditiónina, men eisini fyrilestrar um kristindóm. Nú gongur lei›in so til Føroyar at halda møtir.

Ta› eru Bár›ur Kass Nielsen og Raymund Langgaard úr Heimamissións Ungdómi, sum hava sett seg í samband vi› Morten og hava fingi› fer›ina í lag. Teir sendu eitt t-bræv til Morten, har teir fregna›ust, um ta› mundi bera til hjá honum at koma til Føroya, og hesum var hann sinna›ur í.

– Eg eri ógvuliga spentur at koma til Føroyar, av tí at eg ongantí› havi veri› her fyrr, sigur Morten.

Serliga er ta› tann stórsligna føroyska náttúran, sum Morten gle›ir seg at síggja, men eisini gle›ir hann seg at møta nógvum n‡ggjum fólki, sum fara at koma til hansara møtir. Hann leggur stóran dent á, at øll eru vælkomin til hansara møtir, óansæ› um tey eru trúgvandi ella ikki.

– Eg vænti, at munur er á dønum og føroyingum, men ta› ver›ur spennandi hjá mær at síggja hvørjir hesir munir eru, svarar Morten til spurningin, hvat hann væntar sær av fer›ini til Føroya.

Vónar at fáa nøkur gó› møti

Ta›, sum er mest umrá›andi vi› fer›ini hjá honum, eru sjálvsagt møtini. Morten væntar eisini, at vera vi› til at hava nøkur gó› møti her í Føroyum, bæ›i í Havn og í Klaksvík.

– Eg vóni, at tey, sum koma á møti, uttan mun til um tey trúgva á Jesus, fara at uppliva, at hann er til, og at Gud ynskir at vera Gud fyri okkum menniskju, grei›ir Morten Josefsen frá.

Morten skal hava seks møtir í Føroyum. Hetta vikuskifti› ver›a møtini uppi í ítróttarhøllini á Hálsi, mánadagin og t‡sdagin ver›a møtini í Meinigheitshúsinum í Havn og mikudagin gongur lei›in nor› til Klaksvíkar, har møti ver›ur í KFUM og K. Øll møtini ver›a klokkan átta, men sunnudagin ver›ur møti kl. seks.

Eitt av evnunum, sum ver›ur vi›gjørt á møtunum, er gle›in vi› at trúgva á Jesus. Morten leggur sera stóran dent á, at trúgvandi kunnu vísa gle›i vi› at trúgva. Onnur evni, sum ver›a vi›gjørd, eru Guds frælsi, sum hann gevur teimum, i› trúgva, og eisini fer Morten at tosa um at hava eitt tætt samband vi› Gud.

Royndir úr Robinson Ekspeditiónini

Spurdur um hann fer at n‡ta royndir, sum hann fekk í Robinson Ekspeditiónini, er svari›, at hann fer ikki at halda nakran Robinson-fyrilestur, men at hann fer at taka nakrar av royndunum frá oynni vi› í sínar talur. Sum dømi nevnir hann, hvussu hann upplivdi, at Gud var vi› honum á oynni. Møtini ver›a kalla› ekspeditiónsmøtir, so ta› er upplagt, at ymiskt vi›urskifti frá oynni ver›a tikin vi› í talurnar.

Gud sparkar reyv

Á heimasí›uni hjá Morten hevur hann eitt slagor›, sum sigur: »Gud sparker røv«. Fleiri hava tiki› sær hetta slagor›i› nær, men Morten vísir á, at ta› er bara fyri at skapa áhuga fyri hansara møtum og fyrilestrum, at hann n‡tir eitt slíkt slagor›.

Hetta slagor› hevur tveir t‡dningar. Annar er, at tá i› Gud kemur ov nær kann ta› henda at vit fáa ilt, av tí at hann vil gera okkum í stand. Hin t‡dningurin er, at tá i› vit fáa eitt spark í endan, ver›a vit sett í rørslu frameftir, og ta› er ta›, sum Gud vil vi› okkum, sigur Morten á heimasí›u sínari.

Stórt PR-arbei›i

Fyrireikararnir av møtunum hava gjørt eitt stórt arbei›i fyri at gera hetta tiltaki› kent millum manna. Millum anna› eru eini túsund plakatir prenta›ar, og tær hanga runt um í landinum. Eisini koyrir ein b‡arbussur runt vi› Robinson-Morten á sí›uni.

Eisini vænta fyrireikararnir nógv fólk til møtini. Serliga í vikuskiftinum, har ítróttarhøllin er leiga› til endamáli›.

Sera nógvur tónleikur ver›ur á hesum møtunum, og nakrir av teimum kendastu gospelbólkunum fara eisini at seta sín dám á møtini. Fyrireikararnir siga, at møtini eru serliga ætla› ungum fólki, og tí hevur tónleikur ein stóran leiklut á møtunum. Millum kendastu nøvnini, sum ver›a vi› eru I AM og Magni Christiansen. Eisini luttaka ungdómskóri› VOX úr Eysturoynni, MMM, Adonja og Chorus.



Morten Josefsen kendur sum Robinson-Morten

Roykiforbo› í svimjihøllini

Í skrivi frá Tórshavnar Kommunu ver›ur álagt lei›aranum av svimjihøllini í Havn at seta í verk roykiforbo› í høllini

STEFAN Í SKORINI

Á fundi tann 7. juni samtykti mentamálanevndin hjá b‡rá›num at heita á umsitingina í svimjihøllini um at seta roykiforbo› í verk, og svimjihallarlei›arin, Heri Olsen, skal skipa so fyri at samtyktirnar hjá nevndini ver›a settar í verk.

Enn er einki roykiforbo› sett í verk í svimjihøllini, av tí at tey fleiri av starvsfólkunum og hallarlei›arin eru í summarfrí, men tá i› hesi eru afturkomin ver›ur roykiforbo› sett í verk í svimjihøllini. Ta› ver›ur neyvan eitt fullkomi› roykiforbo› fyri alla svimjihøllina. Talan ver›ur kanska um at gera eitt roykirúm fyri starvsfólki, men enn er óvist, hvussu hetta roykiforbo›i› fer at virka.

Kaj Leo Johannesen, forma›ur í mentamálanevndini, sigur, at allur tann almenni parturin av svimjihøllini skal ver›a roykfríur. Hvussu starvsfólki› innrættar seg til roykiforbo›i› ver›ur upp til tey og lei›aran.

Eisini sigur hann, at ætlanin er at áleggja fleiri almennum stovnum í Havn at seta í verk roykiforbo›, men at hetta enn bert liggur í luftini og er ikki endaliga avgjørt. Kanska ver›ur svimjihøllin tann fyrsti av fleiri almennum stovnum, sum skulu seta roykiforbo› í verk.

Ritan afturkomin

STEFAN Í SKORINI

Seinastu dagarnar hevur Ritan veri› til botneftirlit á bedingini í Vestmanna, og tí hevur Ternan I siglt ímillum Nólsoy og Havnina. Ritan kom tó aftur úr Vestmanna í gjár, og er tí nú aftur í sigling millum Havnina og Nólsoyar. Ternan I fer mánadagin aftur í sigling ímillum Havnina og Skálafjør›in.

3arin ELECTRONIC
bjóðar bestu dygd innan teldur og telduútgerð.
Vit umboða m.a. Fujitsu og Siemens og hava eitt gott úrval av:
- TELDUM
- FARTELDUM
- KT-KALENDARUM
- FARTELEFONUM
- PC-SPØLUM
- PLAYSTATION
- PRINTARUM
- YM. TILHOYRI
Hoyr meira um okkara kvøld-service
Góður í ráðum - við munadyggari service frá formula.fo
3arin ELECTRONIC OG formula.fo
SMS · Tel 353537 · Fax 353536
E-mail: tryarin@post.olivant.fo